

*Nýggi og snotuligi dagstovnurin á Landavegnum hevði móttøku fríggjadagin. Til høgru síggjast Kirstin Djurhuus, leiðari, og borgarstjórin, Jan Christiansen.*



# Dagstovnurin á Landavegnum latin upp

**Fríggjadagin 8. oktober lat Dagstovnurin á Landavegnum alment upp. Í tí sambandi varð móttøka hildin, og nógv fólk nýttu høvið at støkka inn á gólvið. Bæði smá og stór komu at forvitnast, hoyra talur og sang, og smakka frálíka kakumannin**

DAGSTOVNUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Krtistian Vang*

Skráin fyri dagin hevði nakað at bjóða øllum. Fyrsta talan varð hildin av borgarstjóranum, Jan Christiansen. Eftir taluna komu smáir gestir úr Dagstovninum Lítlaskógi fram á gólvið. Saman við Judith í Brekkunum sungu børnini nakrar sangir, og síðani var aftur ein røða hildin, hesuferð av Heðini Mortensen, sum er formaður í mentamáladeildini hjá býráðnum.

Eftir at alt tað formella var fingið frá hondum, var høvi at síggja stovnin, heilsa uppá starvsfólkið og njóta ein flottan kakumann og okkurt drekkandi.

Leiðari á stovninum við Landavegin er Kirstin Djurhuus. Hon hevur drúgvar royndir við barnagarðs- og vøggustovuarbeiðið, millum annað hevur hon í fleiri ár verið leiðari í barnagarðinum undir Fjalli, sum eisini hevur bæði barnagarð og vøggustovu.

Í Dagstovninum á Landavegnum fara 48 børn at hava sína dagligu gongd. Tey verða býtt upp í fýra stovur, sum allar vera fyri vøggustovubørn í fyrstuni. Seinni verða tvær av stovunum nýttar til barnagarðsbørn. Tað skiftið kemur náttúrligt, sum børnini eldast.

Í Dagstovninum við Landavegin arbeiða 14 starvsfólk.














Glasstovan søkir eftir yvirtænara at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt leiðarastarv við tilvísing til stjóran. Yvirtænarin fær ábyrgdina av:
- Eini professionellari kundatænastu, sum svarar til eitt hotel við 4 stjørnum
- Rakstrinum av matstovuni, veitslu- og fundarvirkseminum
- Vøruinnkeypi og vørugoymslu
- Starvsfólkaviðurskiftum
- Øðrum viðkomandi uppgávum

**Umsøkjarin**
Vit vænta, at umsøkjarin hevur:
- Viðkomandi útbúgving
- Leiðsluroyndir, vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Góðan kunnleika til mat og vín
- Góðan teldu- og málkunnleika
- Professionellan hugburð
- Góð samstarvsevni

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Fakligar avbjóðingar
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald
- Kappingarførar setanartreytir

Umsóknir skulu sendast til:

***Hotel Føroyar P/F,***
***Postsmoga 3303,***
***110 Tórshavn***

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 8. november 2004

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Johannes Jensen, stjóra á 31 75 00.

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

petur & petur • 320870

hotelforoyar.com




Hotel Føroyar søkir eftir húsavørði at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv, við tilvísing til stjóran. Starvið umfatar alt dagligt viðlíkahald á hotellinum innan - og uttandura, tænastuuppgávur í smb. við tiltøk, innkeyp av rakstrarlutum umframt aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er sjálvstøðugur, álítandi og sera ágrýtin. Royndir og/ella útbúgving innan el, vvs, tøkni ella líknandi er ein fyrimunur.

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt fjølbroytt fulltíðarstarv við nógvum avbjóðingum.

Umsóknir skulu sendast til:

***Hotel Føroyar P/F,***
***Postsmoga 3303,***
***110 Tórshavn***

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. november 2004

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Johannes Jensen, stjóra á 31 75 00.

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

Hotel Føroyar

petur & petur • 320870

hotelforoyar.com




## Tænaralærlingar

Glasstovan søkir eftir tveimum tænaralærlingum at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir. Lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi, har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli, fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi. Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Tummas Láadal, yvirtænara á 31 75 00.

## Kokkalærlingar

Glasstovan søkir eftir tveimum kokkalærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 4 ár. Lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, umframt matgerð á hægri støði, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi. Vit vænta, at tú ert ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú kokkalærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til høvuðskokkin Gunndur Fossdal á 31 75 00.

## Móttøkulærlingur

Hotel Føroyar søkir eftir einum móttøkulærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir. Lærutíðin umfatar starvsvenjing á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi. Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú móttøkulærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til móttøkuleiðaran Unn Hilduberg á 31 75 00.

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

Allar umsóknir skulu sendast til:
***Hotel Føroyar P/F, Postsmoga 3303, 110 Tórshavn***
Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 8. november 2004

Hotel Føroyar

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870

hotelforoyar.com